# Barnatannrøktin 50 ár

Í dag, fríggjadagin 11. september frá kl. 15-17 verður ein almenn móttøka í sambandi við at barnatannrøktin í Tórshavnar Kommunu hevur 50 ár á baki. Byrjað verður í Eikilund á skúlanum í Kongagøtu ( nýggjasti partur av Kommunuskúlanum.) Aftaná verður opið hús, myndaframsýning og drekkamunnur á tannlæknastovuni í Tórsgøtu.

Í 1959 kom tann fyrsta skúlatannlæknastovan við kommunalt settum tannlækna í Havn sum tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Barnatalið 0-16 ár, ið fá tilboð um tannrøkt í Suðurstreymi, eru í dag sløk 5.000 børn. Tilsamans 20 starvsfólk arbeiða í barnatannrøktini Tórshavnar kommunu, harav fimm tannlæknar og tveir tannrøktarar.

*mg*



*Her eru starvsfólkini á tannlæknastovuni íklødd sum Karius og Baktus í samband við mentunarnáttina 2009*

# Klædnahandil 45 ár

Klædnahandilin „hjá Kissa“, sum er ein partur av býarmyndini í Havn, verður 45 ár mánadagin 14. september 2009.

Mánadagin eru 45 ár liðin síðan Jens Christian Christiansen (Kissa) byrjaði at handla við mannfólkaklæðum í miðbýnum í Havn. Eftir at hava arbeitt í handlinum hjá Hans Joensen í Niels Finsensgøtu í meira enn 30 ár, stovnaði Jens Christian Christiansen, vanliga nevndur Kissa, sín egna klædnahandin við mannfólkaklæðum á horninum Sverrisgøta/ Tórsgøta í 1964.

Kissa varð føddur í Havn 27. juni 1916. Hann var serliga kendur sum sílaveiðumaður, og hann var ein av undangongumonnunum í Føroya Sílaveiðufelag. Tær flestu fríløturnar á yngri árum brúkti hann við tráðuni. Eitt annað av frítíðarítrivum hansara, var frímerkjasavningin, og har var hann mettur at vera ein rættiligur „kapasitetur“.

Saman við svágrinum Peturi Háberg stovnaði Kissa „Norrøna Forlagið“. Teir góvu út bøkur og annað tilfar á føroyskum. Eftir nøkur ár gevast teir við forlagnum og við endan av fýratiárunum fóru teir at innflyta bilar úr Onglandi og stovnaðu Bilasølan Norrøna.




*Starvsfólkini hjá Kissa f.v.: Birgir Carlsson, Elin Guttesen og Jona á Borg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kissa var eisini ein av stovnarunum av Barnahjálpargrunninum saman við Peturi Háberg, Ludvík Breckmann og øðrum. Grunnurin varð stovnaður undir krígnum, og hevði sum endamál at hjálpa neyðstøddum børnum.

Kissa andaðist 14. desember 1996, 80 ára gamal. Eftir tað yvirtók dótturin, Elin Guttesen, handlinum. Í dag eru tað Elin og sonurin Birgir Carlsson sum stjórna handlinum.

45 ára stovningardagurin verður hátíðarhildin við eini stórari útsølu hjá Kissa, sum byrjar mánamorgunin og verður alla komandi viku.

*mg*

# Trygvi Midjord 65 ár

Leygardagin 12. septembur verður Trygvi Midjord í Hvalba 65. Trygvi sleit sínar barnaskógvar í býarpartinum við Neyst, sum einasti beiggi í einum systkinaflokki uppá fimm. Tríggjar av systrunum Anna Elisa, Margit og Sólgerð búgva í Hvalba, meðan tann elsta systurin Paulina býr í Tórshavn. Foreldrini vóru Kristianna og Jacob Midjord.

Trygvi royndi sum ungur sjólívið, og fiskaði hann bæði í Grønlandi og undir Íslandi. Sum nógvir aðrir Hvalbingar arbeiddi Trygvi eisini á kolinum.

Miðskeiðis í 60-árinum fór Trygvi undir at koyra rutu millum Hvalba og Tvøroyri. Tey fyrstu nógvu árini privat, inntil 1984 tá hann fór at koyra fyri Bygdaleiðir. Í 1973 giftust Trygvi við Rutt Jensen av Tvøroyri. Stutt eftir fluttu tey frá barnaheimunum hjá Trygva og niðan á Neystabø. Trygvi og Rutt hava trý børn: Jákup, sum býr í Nesi í Hvalba, Diana sum býr í Hvalba og Kristian, sum býr í Danmark. Abbabørnini eru sjey í tali og eru tey sera góð við Trygva abban.

Trygvi hevur haft ómetaligan stóran týdning fyri Bóltfelagið Royn, har hann hevur havt sína dagligu gongd í mong ár. Trygvi er enn virkin í felagnum sum venjari. At Trygvi hevur verið Royn ein hollur stuðul í mong ár, sæst aftur við at felagið hevur gjørt hann til heiðurslim.

Trygvi er sera handaligur og sæst hetta aftur í nógvum heimum í Hvalba. Ikki minst hevur hetta komið børnunum væl við, nú tey hava sett sær búgv. Nógv kundi verið skrivað aftrat um Trygva abban, men vit vilja við hesum fáu orðum, takka tær so hjartaliga fyri alt og ynskja tær hjartaliga tilukku við degnum.

*Ójavnt Harrin gávur býtir,*
*ein fær færri, annar fleir,*



*hvør sum væl tær gávur nýtir,*
*honum vil Guð geva meir,*
*vist vit fingu øll so frægt,*
*at um vit tað nýta rætt,*
*heim til Guðs vit skuldi náa,*
*ævigt lív og sælu fáa.*

**Kona, børn, svigarbørn og abbabørn**

## Føðingar



*6. sept. fingu Karina og Heini eina lítlasystir. Hon vigaði 3950 g. og var 55 cm long. Foreldur teirra eru Judith Eysturtún Rubeksen og Jógvan Rubeksen og tey búgva í Hoyvík*

*3. august fingu Sára og Linn Augustinussen Keypmannahavn eina dóttur. Hon vigaði 2730 g og var 50 cm long.*

*Her situr stórasystir Hjørdis við didduni*



30. august fingu Christian og William eina lítlasystir, sum eitur Kendra. Hon var følld í Oslo, var 50 cm long og vigadi 3200 g. Foreldur teirra eru Randi og Nicholas Holm.

30 august fingu Ingun Hentze og Teitur Heindriksson, Tórshavn/Kirkjubøur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4400 gr.

2. september fingu Bjørg Einarsdóttir Olsen og Jákup Mortensen, Argir, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

3. september fingu Aranya Siamthaisong og Mourits Eyðunsson, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3300 gr.

3. september fingu Saranja Hammer og Roy Kilgour, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2800 gr.

4. september fingu Anna Sofía og Henrik Mellemgaard, Tórshavn, ein son. Hann eitur Andrias Mellemgaard. hann var 53 cm langur og vigaði 3250 gr.

5. september fingu Bennvør Ferjá Eyvindsson og Benjamin Foged, Keypmannahavn, ein son á Hvidovrehospital. Hann var 53 cm langur og vigaði 3478 gr.

5. september fingu Hansi í Kálvalíð og Súni Jacobsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3800 gr.

6. september fingu Ranveig Meinhardsdóttur og Helgi Hansen, Strendur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

6. september fingu Judith Eysturtún Rubeksen og Jógvan Rubeksen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

7. september fingu Lillian Djurhuus og Bjørn Thorsteinsson Hoyvík ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4800 gr.

7. september fingu Edda Hjartvardsdóttir og Jan Odmarsson, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3550 gr.

7. september fingu Beinta Dalsgarð og Jónsvein Bærentsen, Argir, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2910 gr.

9. september fingu Vanja Dam og Ragnar Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3150 gr.

10. september fingu Linda og Dánjal Debes, Oyri, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4350 gr.

10. september fingu Anna Maria Sivertsen og Mourits Sørensen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 4000 gr.